SKYN



## Sethús

### Tróndargøta 55, 100 Tórshavn

217 205 3 6

Talan er um eini sethús í trimum hæddum, ið standa í miðbýnum í Tórshavn, so skjótt er til alskyns hentleikar.

Í ovaru hæddini er trappugongd, 3 kømur, vesi og baðirúm. Í miðhæddini er durur og trappugongd, kamar, køkur og stova. Í niðastu hædd er kjallari, fýrrúm og vaskirúm. Harumframt er ein íbúð við duri, tveimum kømurum, baðirúm og køkur og stova í einum.

Húsini treingja til ábøtur, ið loyvir einum keypara at seta egnan dám á ognina.

GG. Vísandi til, at seljarin er Føroya Skiftisrættur vegna alment skift skuldarfrágongubúgv, eru serligar treytir galdandi bæði í mun til boðgeving og ábyrgdarfráskriving. Hetta bæði tí at seljari ikki fekk nakað tilboð upp á eigaraskiftistrygging, men somuleiðis tí at ein ábyrgdarfráskriving er sett inn, nú talan er um deyðsbúgv.

**Prísuppskot 2.500.000 kr.**

Dømi um fígging: Afturgjaldstíðin er 25 ár

| | |
|---|---|
| Útgjald, 10% | **Kr. 250.000** |
| Mðr. gjald – áðrenn rentustuðul | **Kr. 13.498** |
| Mðr. gjald – eftir rentustuðul | **Kr. 11.536** |

Útrokningin er vegleiðandi. Vit taka støði í, at rentan er óbroytt alt tíðarskeiðið á 4,95% fyri alla lánsupphæddina, og at rentustuðul er 35%. Rentustuðul verður bert veittur til egnan bústað. Hædd er tikin fyri vanligum kostnaðum, so sum stovningarprovisión, tinglýsing og avgreiðslugjøldum.

Kortalmynd


Útskrift
føroyakort
Várðagøta
Villumsgøta
Niels Finsens gøta
Tróndargøta
Brekkugøta
Heygsbreyt
Útskrivað 02-06-2023

# Lýsing 1

| | |
|---|---|
| Fyriliggur húsaskoðan og seljarans upplýsingar | Ja |
| Bjóðar seljari eigaraskiftistrygging galdandi í 5 ár | Nei, seljari hevur umbiðið tilboð um ognarskiftistrygging, men orsakað av viðmerkingum í húsaskoðan og seljarans upplýsingar, fekk seljari einki tilboð. Sí viðmerkingar á aftastu síðu, undir serligar viðmerkingar um ognina fyri nærri kunning um ábyrgdarfráskriving og rættarvirknað hesum viðvíkjandi. |
| Serlig ábyrdarfráskriving - deyðsbúgv | Vísandi til at seljarin er Føroya Skiftirættur vegna alment skift skuldarfrágongubúgv verður ognin seld uttan ábyrgd fyri skiftirættin, búgvið, medhjálparan og arvingarnar, og kann keyparin sostatt ikki seta fram krav um endurgjald ella avsláttur í keypspeninginum fyri møguligt brek í ognini. Ábyrgd er einans fyri vanheimild. |
| Serligar boðstreytir | Vísandi til, at seljarin er Føroya Skiftirættur vegna alment skifti, verður boðað frá, at tá vit hava móttikið nøktandi boð, ella hava móttikið boð á prísuppskotið ella hægri, og einki annað mótboð er komið innan freistin er farin, verður boðað bjóðara frá, at ognin í útgangsstøði er seld, men at endalig søla er treytað av, at Føroya Skiftirættur góðtekur søluna. Endalig góðtøka frá Føroya Skiftirætti kann væntast at taka nakað av tíð í summarferiuni. |

| | |
|---|---|
| Slag | Sethús |
| Matrikkul | 824 Tórshavn |
| Grundøki stødd | 205 m$^2$ sambært tingbókarváttan |
| Uttandura mát av ognini | 217,4 m$^2$ tilsamans sambært húsaskoðan |
| Byggiár | Mett verður frá einaferð í uml. 1940'inum, sambært húsaskoðan |
| Hæddir | 3 hæddir |
| Tekningar | Nei |
| Atgongd til ovasta loft | Ja |
| Kort | www.kortal.fo |
| Hví selur seljarin? | Talan er um deyðsbúgv |
| Er leigari í ognini? | Nei |
| Nær kann yvirtøkudagur væntast at vera umleið? | Eftir nærri avtalu |
| Verður ognin vaskað og ruddað áðrenn yvirtøkuna? | Nei |

# Umsiting

| | |
|---|---|
| Møguligar umvælingar | Sí. húsaskoðan og seljarans upplýsingar |

## Innrætting

| | | |
|---|---|---|
| Ovasta hæddin | 70,2 $m^2$<br>sambært húsaskoðan | Trappugongd, 3 kømur, vesi og baðirúm. |
| Miðhæddin | 77 $m^2$<br>sambært húsaskoðan | Durur / trappugongd, kamar, køkur og stova |
| Niðasta hæddin | 70,2 $m^2$<br>sambært húsaskoðan | Kjallari / fýrrúm / vaskirúm. Harumframt er ein íbúð við duri, 2 kømur, baðirúm og køkur og stova í einum. |
| Annað | | Harumframt er ein hjallur |
| Parkeringspláss | | Nei |
| Prísuppskot | | 2.500.000 kr. |

## Lýsing 2

| | |
|---|---|
| Bilhús | Nei |
| Hjallur | Ja |
| Tilbygningur | Nei |
| Tak | At síggja til aluminium |
| Loft | Ymiskt |
| Álegging | Ymiskt |
| Vindeygu | Timbur |
| Termorútar | Ja |
| Úthurðar | Timbur |
| Klædningur | Timbur |
| Bjálving | Veit ikki |
| Innveggir | Veit ikki |
| Innhurðar | Timbur |
| Trappa/ur | Timbur innandura og betong uttandura |
| Grund | Betong og lagað grót |
| Hitaskipan | Oljufýring / ketil |
| Oljutangi | Ja |
| Brenniovnur | Nei |
| Luftskipan / ventilatión | Nei |
| Gólvhiti | Veit ikki |
| Køkur | Ja |

## Útreiðslur

| Rakstrarútreiðslur | Litrar/kwt | Kr./mðr. | Kr./ár |
|---|---|---|---|
| Orku-/oljunýtsla | | Veit ikki | |
| El | | Veit ikki | |

Skyn · Oknarvegur 5 · Boks 83 · 110 Tórshavn
Tlf. 35 74 00 · skyn@skyn.fo

## Tikið inn

| Navn: | Jobin S. Drangastein | Tlf.: | +298 23 44 05 | Dagfesting: | 11.07.2023 |
|---|---|---|---|---|---|

### Kunning og serligar viðmerkingar um ognina og sølutilfar annars

Upplýsingar í bústaðarlýsingini eru givnar eftir eigarans bestu sannføring. Tað kann ikki væntast, at eigarin hevur nøktandi kunnleika til standin og støðuna, hetta eitt nú innlit í rør-, hvs-, el- og kloakkeringsviðurskifti v.m., og má fyrilit takast fyri hesum, og tískil verður altíð mælt til, at áhugaðir keyparar hava serkøn við sær at sýna og gjøgnumganga ognina, áðrenn tey bjóða upp á ognina.

Húsaskoðan og seljarans upplýsingar fyriliggja, og tískil er sera umráðandi, at áhugaður keypari lesur hesi skjøl gjølla, og kannar nærri viðmerkingarnar í hesum skjølum, serliga tá ið tað er frámerkt við KN, S3, S2 og S1, tí at keyparin ikki kann gera galdandi møguligar manglar, sum víst verður á í húsaskoðanini (støðufrágreiðingini), og seljarans upplýsingum.

Hesar viðmerkingar eru soleiðis ein kunning um standin á ognini, men eisini ein ábyrgdarfráskriving frá seljarans síðu, ið ikki er møguligt hjá keypara at koma afturumaftur við, eftir at ein avtala um keyp er gjørd.

1. Serligar viðmerkingar um ognina

   Seljari hevur fingið gjørt eina húsaskoðan og eisini fyriliggja upplýsingar frá seljara um ognina, og somuleiðis hevur seljari umbiðið tilboð um ognarskiftistrygging frá tryggingarfelagi, men orsakað av viðmerkingum í Húsaskoðan og Seljarans upplýsingar um standin á ognini, fekk seljari einki tilboð.

   Tískil er av týdningi, at ein boðgevi kannar alt sølutilfarið gjølla og fær ein byggiráðgeva ella serkønan innan økið at hyggja eftir og kanna ognini gjølla saman við sær.

   Á hesum fult upplýsta grundarlagi, ið boðgevi góðtekur, má ein boðgevi so taka avgerð, um hann ynskir at keypa ognina, og, um so er, fyri hvønn prís.

   Hædd er tikið fyri hesari ábyrgdarfráskriving í prísuppskotinum.

Dagfest:

Undirskrivað av seljara: